# *Starvsskipan*

## Nevndarskipan og nevndarfundir

§ 1
So skjótt aðalfundur hevur verið – ella ein eykaaðalfundur, har broytingar eru hendar í samansetingini av nevndini – heldur nevndin fund.

Eftir hetta heldur nevndin fund, tá nevndarlimur ella limur av stjórnini biður um tað, fyri at fáa viðgjørt ítøkiliga ávíst evni. Áheitan um nevndarfund skal vera stílað til formannin skrivliga við eini frágreiðing um orsøkina til, at uppskotið verður sett fram.

Á hvørjum nevndarfundi verður – um hetta ber til – ásett, nær næsti nevndarfundur verður.

## Innkalling til nevndarfundir

§ 2
Nevndarformaðurin kallar inn til nevndarfund skrivliga við minst 14 daga varningi. Varningurin kann tó verða styttur, um serlig viðurskifti gera tað neyðugt.

Við innkallingini skal verða send fundarskrá og eitt eintak av tí skrivliga tilfarinum, sum er neyðugt til viðgerðina av teimum einstøku evnunum.

Harafturat skulu limirnir – um hetta ber til – fáa upplýsing um orsøkirnar til viðgerðina av teimum fyriliggjandi evnunum.

## Fundarleiðsla og viðtøkuføri

§ 3
Formaðurin leiðir nevndarfundirnar. Fundirnir verða hildnir á skrivstovu felagsins, á skrivstovuni hjá formanninum ella øðrum av formanninum ásettum stað.

Tá fundarinnkalling er framd samsvarandi ásetingunum í § 2 er nevndin viðtøkufør, tá minst tveir av nevndarlimunum eru møttir.

Í øðrum førum er nevndin viðtøkufør, tá allir, sum hava atkvøðurætt, eru hjástaddir – ella umboðaðir av hjástaddum limum – og allir samtykkja.

Nevndarlimirnir – og onnur hjástødd – hava skyldu til beinanvegin at geva nevndini boð um eini og hvørji viðurskifti, sum kunnu hava við sær møguligt ógegni.

Allar nevndarviðtøkur krevja vanligan meiriluta millum teir á fundinum møttu nevndarlimir.

## Gerðarbók

§ 4
Formaðurin syrgir fyri, at gerðarbók verður førd yvir nevndarviðgerðir og avgerðir.

Av gerðarbókini skal framganga:
1. Hvør hevur leitt fundin,
2. Hvør hevur verið við á fundinum, og
3. Fundarskrá og avgerðir fyri hvørt einstakt mál á skránni.

Avrit av fundarfrásøgnini verður sent øllum nevndarlimunum skjótast til ber – og í síðsta lagi 14 dagar – eftir at fundurin er hildin.

Allir hjástaddir limir skulu skriva undir fundarfrásøgnina og við hesum játta sína góðkenning av frásøgnini.

Limir, sum ikki hava verið við á fundi, sum frásøgn er frá, og stjórnin skulu í gerðarbókini viðmerkja, at tey hava kunnað seg um innihaldið.

## Leiðsla av felagnum

§ 5
Nevndin stendur fyri leiðsluni av viðurskiftum felagsins og skal syrgja fyri einari forsvarligari skipan av virksemi felagsins.

Nevndin skal gera stevnumið og leiðbeiningar, sum skulu galda fyri stjóran, og skal hava eftirlit við, at stjórin leiðir á forsvarligan hátt samsvarandi hesum.

Hvør nevndarlimur kann biðja um allar tær upplýsingar, ið tørvur er á fyri at røkja teirra uppgávur, heruppií eisini at hava eftirlit við bókum felagsins og ansa eftir, at ognir felagsins eru til.

Nevndin setur stjóran í starv og loysir hann úr starvi.

§ 6
Nevndin viðger og avger øll mál, sum eftir felagsins viðurskiftum eru av óvanligum slag ella støðd.

Tað áliggur nevndini at viðgera allar serligar íløgur, upptøku av nýggjum vinnuøkjum og spurningar um at ogna fastogn og at avhenda ella veðseta fastogn.

## Stjóraluttøka á nevndarfundum

§ 7
Á hvørjum nevndarfundi leggur stjórin fram frágreiðing um virki felagsins síðan seinasta nevndarfund.

Harafturat leggur stjórin fram dagfestar roknskapir og fíggjarætlanir, sum nevndin hevur biðið um.

Stjórin kunnar samstundis nevndina um óvanlig ella serlig viðurskifti, eins og stjórin svarar øllum spurningum, ið nevndarlimir ynskja svar uppá.

**Ársroknskapur**

§ 8
Stjórin ger uppskot um ársroknskap og leggur hann fram í so mikið góðari tíð, at ein av grannskoðanini gjøgnumgingin ársroknskapur kann vera latin nevndini í seinasta lagi 2 mánaðir eftir, at roknskaparárið er endað.

Ársroknskapurin verður síðani viðgjørdur á einum nevndarfundi, har ið nevndin tryggjar sær, at roknskapurin er gjørdur samsvarandi viðtøkunum og galdandi lóggávu.

Á hesum fundi ger nevndin ársfrágreiðingina og tilmæli til ársaðalfundin um nýtslu av avlopi ella rindan av halli sambært fyriliggjandi ársroknskapi.

Síðan undirskriva nevndarlimirnir ársroknskapin og ársfrágreiðingina.

**Grannskoðan, grannskoðanarfrágreiðing og keyps- og sølubók**

§ 9
Grannskoðanin hevur rætt og skyldu til at taka lut á tí nevndarfundi, har ársroknskapurin verður viðgjørdur, og skal m.a. siga sína hugsan, um ársroknskapurin og ársfrágreiðingin eftir hansara fatan hava við allar neyðugar upplýsingar, til at metast kann til fulnar um búskaparligu viðurskifti felagsins.

§ 10
Nevndarformaðurin skal syrgja fyri, at felagsins gerðarbók, grannskoðanarfrágreiðing og keyps- og sølubók eru til staðar á hvørjum nevndarfundi.

Hvør nevndarlimur skal við undirskrift síni játta at hava gjørt seg kunnugan við eina og hvørja føring í hesar, og hevur til eina og hvørja tíð rætt til at biðja um at fáa eftirhugt bøkur og frágreiðingar.

**Tagnarskylda**

§ 11
Nevndarlimir hava tagnarskyldu um alt tað, ið teir sum nevndarlimir fáa kunnleika um, um ikki talan er um viðurskifti, sum eru ætlað – ella sambært lóggávuni – at skula almannakunngerast.

Um nevndarlimur fer frá, skal hann beinanvegin geva nevndarformanninum aftur alt tað trúnaðar tilfar, hann hevur, umframt møgulig avrit av hesum.

---

Soleiðis samtykt á nevndarfundi tann /5 / 9 2005.

Í nevndini:

[signatures]